# 15 ár uttan haru

**HARUDAGUR** Veturin 1978-79 var so mikið harður fyri haruna í Nólsoy, at hon snøgt sagt doyði út. Í samfull 15 ár eftir hetta var eingin hara í allari oynni



» Allir mans vóru heima aftur við Brandstøðina kl. 15.30, og tá lógu 98 harur á «lit de parade»

**SIÐUR**

*Nólsoyingar hava sín egna sið, tá talan er um haruveiðu. Henda haran er, til heiðurs fyri myndamannin, bókstaviliga sett upp*

*(Mynd: www.jenskjeld.info)*

Snorri Brend

**Nólsoy:** Í 1925 settu Niels á Botni og Jens Reinert sum teir fyrstu út haru í Nólsoy. Men tað gekk hvørki verri ella betri enn so, enn at tær allar doyðu út veturin 1978-79.

Í 1994 syrgdu Hergeir og Marnar á Skúr fyri, at harur aftur vórðu settar út. Ta fyrstu haruna kom Jógvan á Argjaboða við, og tey fylgjandi árini vórðu 11 aðrar harur, frá ymsastaðni í Suðurstreymoy, settar út.

20. februar í ár kom Meinhard Hansen, Funningsbotnur út til Nólsoyar við einari ungari kvennharu. Henda varð somuleiðis sett út í hagan, til tess at fyribyrgja innannøring millum harurnar.

Ein fastur dagur var ásettur, har tað var loyvt at skjóta haru í Nólsoy. Longu í 1998 vóru 14 harur skotnar. Tað var ásett, at hvør luttakari skuldi gjalda 200 krónur, men tá var íroknað bæði matur og drekka, sum stóð á borðinum fyri harumonnunum, tá teir komu heim aftur.

## 25 mans

Í 2003 ár var so tann árligi harudagurin í Nólsoy settur at verða tann 15. november, skrivar kendi »fuglamaðurin«, Jens-Kjeld Jensen um henda túrin.

Tilsamans 25 mans, teir flestu staðbundnir nólsoyingar, høvdu meldað seg til, og kl. 8.30 fóru teir frá Brandstøðini.

Menninir býttu seg í tvinnar bólkar: Teir eldru og veiku fingu í lut at fara Norður á Boga og Suður í Dalar. Har sótu teir so fyri, tá bólkurin við teimum yngru monnunum kom heimaftur, heilt sunnan av Borðuni, eftir fyrst av at hava gingið niður á Breiðurók og so vórðu endaðir á Oksadalsrygginum. Allir mans vóru heima aftur við Brandstøðina kl. 15.30, og tá lógu 98 harur á »lit de parade«.

Fýra tær størstu vigaðu 3,5 kg, meðan tær flestu lógu um eini 3 kg. Miðalvektin á harunum var 2,765 kg. Hvør maður fekk fýra harur við til húsar, og tann síðsta haran var lutað kokkunum, ið borðreiddu fyri harumonnunum.

– Ein góður dagur var farin at halla, skrivar altso Jens-Kjeld Jensen í Nólsoy.

*snorri@sosialurin.fo*

# 10 UM HARUNA

## Her eru nøkur viðurskifti, ið sermerkja haruna:

1. Haran (frøðiheiti: Lepus) heldur til í skógi og á lyngheiði. Hon leggur ungarnar í holum millum grót og klettar.
2. Haran í Føroyum nevnist snjóhara, men verður meira grálig nú um vetrarnar, av tí at so lítið av kava er.
3. Íslandi eru ongar harur. Snjóharan er í Føroyum, Skotlandi og oyggjaflokkunum har, Írlandi, Noregi og Svøríki, umframt í Alpunum. Fornfrøðingar hava funnið beinleivdir av henni í norðbúgvabygdum úr víkingatíðini.
4. Bláharan í Føroyum leggur 3 ferðir um árið, tá veðrið er til vildar, men snjóharan leggur bara 2 ferðir. Harumframt fær snjóharan hvíta vetrarbúna sín fyrr um heystið, enn bláharan fær sín blágráa vetrarbúna.
5. Í Føroyum liggur kavin sjáldan leingi, so tað hevur verið nógv verri hjá snjóharuni enn hjá bláharuni at fjala seg fyri harumonnunum.
6. Haran etur plantur, grøs, stargrøs, urtir og trøllakambar, umframt knubbar og endaknappar á runnum og trøum.
7. Pólharan og snjóharan eru virknastar í dimmingini. Men tá ið makingartíðin kemur, og tær renna hvør eftir aðrari og gera seg upp, síggjast tær eisini um dagin.
8. Pólhara og snjóhara verða veiddar, tí at kjøtið smakkar so væl.
9. Hildið verður, at stovnurin í Føroyum í 1997 var umleið 5000 harur, men av tí at harumenn í Føroyum ikki skulu biðja um veiðiloyvi ella geva fongin upp, er torført at meta um, hvussu nógv verður skotið árliga.
10. Í Føroyum er loyvt at skjóta haru frá 2. november til 31. desember.

(Kelda: www.stamps.fo)

## 98 harur

Á heimasíðu síni hevur Jens-Kjeld Jensen gjørt eitt yvirlit yvir skotnar harur í oynni síðani 1998:

1998 - 14 harur
1999 - 24 harur
2000 - 60 harur
2001 - 57 harur
2002 - 79 harur
2003 - 98 harur. Miðalvektin var 2,765 kg.
2004 - 67 harur, 24 honir og 43 hannar. Miðalvektin var 2,637 kg.
2005 - 93 harur, 49 honir og 44 hannar. Miðalvektin var 2,729 kg.
2006 - 54 harur, 36 honir og 18 hannar. Miðalvektin var 2,710 kg.
2007 - 69 harur, 21 honir, 1 av ivasomum kyni og 47 hannar. Miðalvektin var 2,758 kg.
2008 - 73 harur, 64 honir, 1 av ivasomum kyni og 8 hannar. Miðalvektin var 2,632 kg.
2009 - 50 harur skotnar, 14 honir og 36 hannar. Miðalvektin var 2,639 kg. (millum 1,450 og 3,350 kg).
2009 - Millum jól og nýggjár hildu nakrir fáir menn ein óalmennan harudag og fóru út í Junkarshagan og Borðuna, tað er sunnara helvt, og skutu 10 harur, 5 honir og 5 hannar. Miðalvektin var 2,585 kg. (millum 1950 og 3,450 kg).

(Kelda: www.jenskjeld.info)